# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sambandssøga – sum lundi á jólanátt

Fríggjadagin kemur út forkunnug bók – um søguna hjá Føroya elsta politiska flokki, Sambandsflokkinum.

Tað er søgufrøðingurin Anja Andreassen, sum hevur skrivað bókina um flokkin, sum altíð hevur verið tann »skikkiligi flokkurin« í føroyskum politikki, sum hon málber seg. Hon sigur í viðtali við Sosialin í gjár, at »tað hevði kanska verið meira saft og kraft í at skrivað um Jóannes Patursson...«, meðan hon hevur valt, at bókin mest skal snúgva seg um, hvat sambandsfólk hava sagt og skrivað ta seinastu øldina.

Tað verður uttan iva áhugaverdur lesnaður, tí føroyska søgan, sæð úr einum sambandssjónarhorni er forkunnug – ella sum lundi á jólanátt. Uttan at leggja tað sum last fyri nakran, so er tað so – so sum høvundurin nevnir – at sjálvstýrissinnaðu hava merkt søguskrivingina mest. Tilvitað ella ikki so er tað tann søgan, sum fólkaskúlin í stóran mun hevur brúkt sum grundarlag fyri søguundirvísingini, og harvið er tað eisini grundarlagið fyri søgufatan føroyinga sum heild.

Tað skal altso ikki leggjast nøkrum til last, at skrivaða søga okkara hellir á annan ríkisrættarliga veingin, tí sambandsfólk ella javnaðarfólk ella onnur hava sjálvsagt havt sama rætt og sama møguleika at skriva søgu, sum sjálvstýrisfólk. Men vit eiga bara at verða tilvitað um støðuna – og tað er ikki vist, at vit øll eru tað.

Kanska eru vit ov skjót at glorifisera ávísar rørslur og farnar persónar? Vit hava skapt okkum nógvar hetjur, bæði í nýggjari og eldri føroyskari søgu – og altíð er talan um menn (altíð menn!) sum skara fram úr onkursvegna á sjálvstýrisveinginum. Kanska vit stara okkum blind upp á ávís evni hjá hesum monnum, meðan aðrar síður – kanska í øðrum samanhangi daprari síður, elegant verða gloymdar?

Hvussu er og ikki, so verður tað eitt áhugavert íkast í føroyska politiska søgu – sum kanska eisini fer at birta eitt tiltrongt kjak um søguskriving og javnvág, nú Sambandsflokkurin gevur út søgu sína. Vit skulu sjálvandi hava í huga, at hetta er ein bók um sambandsfólk og teirra hugsjónir, nú flokkurin verður 100 ár. Men er hetta á einum vísindaligum støði, ið kann góðtakast, so hava aðrir flokkar nakað at læra.

**Sosialurin**

## SVF heldur hyggjarin fyri háð og spott

**FINNLEIF GUTTESEN**



Tann nógv umrødda føroyska presisheitin hevur í áravís verði eitt eyðkenni fyri SVF og eingin í leiðsluni á SVF tekur seg um reiggj, fyri at stoppa hesari líkasælu, tá ið tað ræður um at halda klokkutíðirnar.

Tit halda hyggjararnar fyri háð og spott, tá ið tit lata teir sita og bíða frammanfyri skermin har einki hendur, sjálv um klokkutíðin sigur nakað annað.

Minsta mark av sømuligheit er, at tit søgdu hvat var galið, ella skrivaðu tað á skermin, so hyggjarin ikki sat sum ein idiotur og bíðaði eftir sendingini.

Umberingar kunnu ikki brúkast til nakað sum helst, stjórin hevur ábyrgdina, hann fær sína løn fyri tað og kann hann ikki klára uppgávuna, má annar stjóri finnast.

## NMT 450 skipanin endaliga sløkt

**KÁRI P. HØJGAARD**
Løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin



Ætlanin hjá Føroya Tele var, at NMT skipanin skuldi niðurleggjast 1. januar 2006. Grundgevingarnar vóru, at londini kring okkum høvdu gjørt tað sama og bert Ísland framhaldandi hevði hesa skipan virkna, tí fingust heldur ongir eykalutir. Dýrt og trupult er at reka fleiri ymiskar skipanir og mett varð, at nú var GSM-skipanin so væl útbygd, at hon var landsumfatandi.

Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins hevur gjørt tað sum gerast kundi, fyri at halda NMT-skipanina virkna, til útbyggingin av VHF skipanini varð liðug. Havi havt brævasamskifti við landstýrismannin í fiskivinnumálum, sum hevði sín positivt virkna leiklut í, at skipanin varð virkin 6½ mánað longri enn ætlað. Men tíðliga mánamorgunin 17. juli 2006 varð NMT-netið sløkt og í samrøðu við landstýrismannin í vinnumálum havi eg fingið staðfest, at tað er endaliga.

Enn er VHF-skipanin ikki fullfíggjað, og støð eru eisini, har ikki fæst samband við GSM. Mín metan er, at NMT 450 átti ikki at verðið niðurløgd, fyrr enn GSM-avloysaraskipanin varð eins góð ella betri, og at VHF netið varð fult útbygt.

Her gerst ikki meira, men tað áliggur politiska myndugleikanum at játta nóg mikið av peningi á fíggjarlógini í ár til at framskunda uppseting og liðugtgerð av VHF-netinum, so hetta stendur liðugt áðrenn ov langt er liðið út á árið 2007.

## Týsku fjølmiðlarnir hita upp til Teitur útgávuna

**Teitur umboðar sítt friðarliga ættarlið við lagnum Louie Louie, skrivar týskur ummælari, ið lovprísar føroyska sangaranum.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Eins og føroysku og donsku fjølmiðlarnir gjørdu, tá Stay Under The Stars hjá Teiti kom út í hesum londum, eru týsku miðlarnir nú farnir undir at lovprísa fløguni. Týska heimasíðan promoshow.de hevur fingið hendur á stakfløguni til Louie Louie, ið umframt Louie Louie hevur løgini I Run The Carousel og Thief About To Break In. Í ummæli av fløguni eru lovorðini stór.

M.a. skrivar ummælarin, at hóast langt er úr Føroyum til New Orleans, bæði landafrøðiliga, mentanarliga og klimatiskt, so krevur tað einans ein listamann við eini visión fyri at støðini tykjast undurfult nær.

Hesin listamaður eitur Teitur og sangurin eitur Louie Louie. Síðan greiðir ummælarin frá um Teit og um upprunan til sangin Louie Louie, ið er ein áheitan á Louie Armstrong um at koma aftur og bjarga okkum við tónleiki. Áðrenn hann endar við at hugleiða um regluna í Louie Louie: “Please come back to the quiet generation, we don’t have any representation”, og spyr um Teitur ikki júst við hesum lagnum og fløguni Stay Under The Stars umboðar sítt friðarliga ættarlið.

Teitur var í farnu viku í Týsklandi og gjørdi samrøður við nógvar týskar fjølmiðlar í sambandi við útgávuna av Stay Under The Stars, sum kemur út har 17. september, so hetta er ivaleyst ikki síðsta grein um føroyska sangarin og sangskrivaran í týskum miðlum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.